
*Bretski fíggjarmálaráðharrin, Gordon Brown, heldur sambært BBC lítið um avrættingina av Saddan Hussain, ið hann heldur líktist eini háðan*

## Saddam avrættaður á ein ræðuligan hátt

Bretski fíggjarmálaráðharrin, Gordon Brown, heldur, at fyrrverandi írakski einaræðisharrin, Saddam Hussain, varð avrættaður á ein "ræðuligan hátt", sum hann rópar hendingina. Hinvegin hevur bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, enn ikki úttalað seg um avrættingina.

- Tá ið vit vita um alt, sum hendi, vita vit eisini, at talan var um eina ræðuliga røð av hendingum í sambandi við avrættingina, sigur Brown í eini samrøðu við BBC.

Væntandi er, at Gordon Brown verður komandi bretskur forsætisráðharri, tá ið Tony Blair fer seinni í ár.

Tað hevur vakt undran, at Tonu Blair einki hevur sagt um avrættingina av Saddam Hussain – serliga eftir, at amatørvideo hava víst, at avrættingin nærmast líktist eini háðan.

- Sjálvt menniskju, sum eru fyri deyðarevsing, hava sæð, at tað, sum hendi undir avrættingini av Saddam Hussain, slett ikki kann góðtakast. Hetta hevur á ongan hátt verið við til at minkað um spenningin millum sjiamuslimar og sunnimuslimar, sigur Gordon Brown í samrøðuni við BBC.

Bretski fíggjarmálaráðharrin er sjálvur ímóti deyðarevsing.

**(-vilmund)**


*Tvær ferðir hava Bakur og Stelkur verið inni við fullum kørum í tilsamans 9 dagar - og kortini vóru manningarnar heima á nýggjárinum. Nógv virksemi var á bryggjuni í Saltangará seinnapartin leygardagin, tá ið Beta-skipini landaðu, og Polarhav og Stjørnan tóku kør umborð til nýggjan túr*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fýra full skip í 9 dagar

**Partrolararnir Bakur og Stelkur eru longu á triðja túrinum, síðan teir fóru útaftur triðja jóladag. Teir landaðu fyrra túrin nýggjársaftan – og seinna túrin leygardagin. Báðar túrarnar høvdu skipini full kør – ella eini 160-170 tons hvønn túrin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í farnu viku hoyrdu vit um sera góða túrin og góðu søluna, sum leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, gjørdu nú um ársskiftið, tá teir landaðu og seldu umleið 210 tons av upsa og eitt sløð av øðrum fiski í Hanstholm fyri 2,4 miljónir krónur.

Í nøgd, veiðivirði og soleiðis eisini í manningarparti var hetta ein óføru túrur.

### Bakur og Stelkur

Men eins og Polarhav og Stjørnan gjørdu ein sera góðan túr, smæðast trolararnir hjá P/F Beta, Bakur og Stelkur, sum Føroya Fiskavirking nú eigur, so sanniliga heldur ikki burtur.

Teir fóru eisini útaftur 3. jóladag og vóru longu inni aftur nýggjársaftan við fullum kørum.

Manningin kundi halda nýggjárið heima, og síðan fóru teir útaftur týsdagin, 2. nýggjársdag.

Longu um middagsleitið leygardagin komu bæði skipini innaftur – og aftur hesaferð við fullum kørum.

Bakur og Stelkur hava umleið 160-170 tons í kørunum, tá ið tey eru full, og soleiðis hava skipini hesar báðar fyrstu túrarnar síðan jól fiskað umleið 330 tons.

Sosialurin var ein túr á bryggjuni í Saltangará leygardagin, tá ið Bakur og Stelkur landaðu.

Beint aftanfyri Beta-skipini lógu Polarhav og Stjørnan, sum júst eru komin aftur úr Danmark.

Leirvíkstrolararnir fingu ikki nóg mikið av kørum í Hanstholm og noyddust tí til lands eftir fleiri kørum, áðrenn tey kunnu fara á annan túrin í hesum árinum.

Út á leygarkvøldið vóru øll fýra skipini longu farin nýggjan túr.

### Óførur fiskiskapur

Sosialurin veit ikki ítøkiliga, hvussu nógv Bakur og Stelkur hava selt fyri hesar báðar túrarnar, men vit hava skilt, at miðalprísurin hevur verið góður – eftir føroyskum mátistokki, helst út við 6 krónur fyri kilo.

Polarhav og Stjørnan leggja tær allar flestu lastirnar upp í Føroyum, men hesaferð gjørdu teir so eina roynd at selja veiðina á "svanga" útlendska marknaðinum. Hetta eydnaðist sera væl. Skipini fingu einar 10-11 krónur í miðal fyri kilo, og tá er hetta nettoprísur.

Tá ið saman um kemur, er munurin á tíðini, hesi bæði pørini hava brúkt um veiði og sigling - og tí, sum fekst burtur úr - neyvan tann stóri.

Ein munur er, at veiðan, sum Beta-skipini fingu hesar báðar túrarnar, kom til virkingar í Føroyum. Hinvegin hava Polarhav og Stjørnan einki at skammast, tí skipini hava lagt manga gylta veiðina upp til virkingar í Føroyum.


*WWF heldur, at útlitini hjá toskastovninum í Norðsjónum, Skagerak og Kattegat eru døpur*

# Toskurin fer at »kollapsa«

**WWF, sum er heimsins náttúrufelagsskapur, stúrir fyri, at nýggja fiskiveiðiavtalan, sum ES-londini samdust um fyri jól, kann elva til, at toskastovnurin í Norðsjónum, Skagerak og Kattegat bráddliga hvørvur**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Politikarar í ES halda fram við at seta havið og framtíðina hjá fiskastovnunum í váða.

Tað sigur Carol Phua, sum tekur sær av fiskivinnumálum hjá WWF í Brússel.

Felagsskapurin heldur, at toskurin á hesum leiðum skuldi verið friðaður burtur av, so stovnurin kann byggja seg uppaftur.

– Men fyri at varðveita friðin í heimlandinum, atkvøða politikarar aftur og aftur fyri kvotum, sum fara langt yvir tað, ið fiskifrøðingar meta vera ráðiligt.

### Onnur fiskasløg

WWF spyr eisini, hvat bleiv av endurbyggingarætlanini hjá ES, tá ið ræður um reyðsprøku og tungu, sum fiskimálaráðharrarnir ætlaðu at røða um í Brússel.

Felagsskapurin sigur, at í dag verða 80% av hesum fiskasløgum tveitt í havið aftur, tí fiskurin er ov smáur. Í hesum sambandi er tað serliga veiðan hjá hálendingum við bummtroli, ið WWF finst at.

Tað órógvar eisini felagsskapin, at Háland framhaldandi sleppur at brúka "elektro-sjokk" í hesum fiskiskapi, tí hesin háttur ger eisini av við onnur fiskasløg og er negativur fyri havumhvørvið.

### 28 skip

– Tað er eisini burtur við, at Frakland og Spania fáa loyvi til at fiska ansjósir í Biskayavíkini, heldur WWF, sum vísir á, at hesin fiskastovnur neyvan megnar at byggja seg uppaftur, tá ið 28 skip við stórari veiðiorku liggja á hesum leiðum.